# Barnaansingin hjá Vágs kommunu

## UPPTØKUREGLUR

- Barnið, og í minsta lagi annað av foreldrunum, skulu verða skrásett í kommununi, fyri at fáa ansingarpláss í skipanini. Eisini kunnu foreldur, ið hava ætlanir um at flyta til kommununa, skriva børn síni á bíðilistan 6 mánaðir, áðrenn flutt verður til kommununa.

- Kommunan kann tó í serligum førum gera undantak frá hesum, t.d. har barnaverndarnevndin hevur givið sítt tilmæli. Eisini kann gerast undantak fyri upptøku av børnum úr øðrum kommunum, um ansingarpláss eru tøk.

- Ansingin er skipa í vøggustovu, barnagarð og dagrøkt. Vøggustovan og dagrøkt er fyri børn 0 – 3 ár og barnagarður er fyri børn í aldrinum 3 – 6 ár. Miðað verður ímóti at børn skifta frá vøggustovu/dagrøkt tá tey eru um 3 ára aldur. Skifti fer fram 3 ferðir árliga, 1. januar, 1. mai og 1. august. Skifti fer fram í samstarvi millum leiðararnir og við ætlitið til tørvin hjá barninum og annars pláss á stovninum báðum.

- Møguleiki er eisini at fáa børn í ansing í avmarka tíðarskeið, treyta av at leiðarin av ansingini kann ávísa pláss.

- Foreldur, ið søkja um ansingarpláss, skulu fáa skrivligt svar frá umsitingini um móttøku av umsóknini. Leiðarin boðar frá nær pláss kann væntast.

- Børn sum fáa ansingarpláss, men har foreldur ynskja at fáa stovnspláss seinni, skulu verða standandi á bíðilistanum.

- Um foreldur av einihvørji orsøk ikki taka av ansingartilboðnum, verður barnið ikki flutt afturum á bíðilistanum..

- Foreldur kunnu søkja um, at barnið fær farloyvi frá ansingini í eitt ár í senn, við trygd fyri, at barnið fær ansingarpláss aftur, tá farloyvistíðin er úti.
  Foreldur kunnu søkja um, at barnið fær farloyvi frá ansingini í styttri tíðarskeið. Foreldrini skulu boða ansingini frá í seinasta lagi 3 mánaðir, áðrenn pláss ynskist aftur.

- Børn við serligum tørvi kunnu koma framum á bíðilistanum, men bert í teimum førum, har barnaverndarnevndin hevur givið sítt viðmæli. (har verður hugsað um málsligar, sálarligar og sosialar trupulleikar).

- Miðast má ímóti, at systkin so vítt møguligt fáa pláss í somu skipan.

- Tá ansingarpláss er tøkt, skal fyrsta barnið á bíðilistanum hava tilboðið. Tó kann aldur og kynsbýtið verða tillagað ansingarskipanini.

- Gjaldsreglur/efturstøða:
  <u>Foreldur gjalda fult ansingargjald fyri 1. og 2. barnið, fyri 3. barnið er gjaldið 50% og fyri 4. barnið 25% av fullum kostnaði.</u>
  Foreldragjaldið fellur til gjaldingar fyrst í hvørjum mánaði, 11 mðr. um árið (juli fríur).
  Um eftirstøðan fyri at hava barn í ansingarskipanini fer upp um 2 mánaðir, kann kommunan ella stovnurin avgera at siga plássið upp, tó soleiðis, at kommunan ella barnaverndin frammanundan hava viðgjørt spurningin, um heimild er at nýta fríplass.
  Vágs kommuna kunngerð á hvørjum árið fyrst í desember gjaldið fyri komandi ár.

- Feria
  Barnaansingin hevur opið í summarfrítíðini, men barnið skal hava feriu samanhangandi 4 vikur, í tíðarskeiðinum 24. juni til 30. august. Barnaansingin hjá Vágs kommunu er stongd millum jól og nýggjár. Og stongt ein ráðleggingardag um várið og ein um heystið.

- Foreldur kunnu kæra avgerðir um upptøku til Mentunarnevndina hjá Vágs kommunu.

- Góðkent á býráðsfundi 23/06-2014
- Góðkent av MMR 07/11-2014